## Størri samhandil

Arbeiðsgevarafeløgini í Grønlandi og Íslandi, NUSUKA og SA, hava skrivað undir ein sáttmála, sum hevur til endamáls at økja samstarvið partanna millum. Harafturat fáa teir grønlendsku arbeiðsgevararnir gagn av teimum royndum, sum íslendingar hava við samhandlinum við ES og onnur lond. Formaðurin í NUSUKA, Ole Aggo Markussen, sigur við útvarpið í Nuuk, at sáttmálin fer eisini at knýta Grønlandi og Ísland tættari hvør øðrum.

## Trygd til øll

Arbeiðsbólkurin, sum hevur skrivað álit um føroyska sjúkrahúsverki í framtíðinim, mælir til, at allir føroyingar skulu hava trygd fyri at fáa viðgerð á sjúkrahúsi, um teimum tørvar tað. Eftir tilmælinum skal tað standa í sjálvari lógini, at sjúk hava rætt til at fáa viðgerð innan eina ávísa tíð. Tað stendur ikki í verandi lóggávu, og letur tað seg ikki gera á einum føroyskum sjúkrahúsi, skal tann sjúki hava rætt til at fáa viðgerð uttanlands.

Stálstuldurin:

# Ákærdu varðhaldsfongslaðir

**Linda Hesselberg, ákæri, vil einki annað upplýsa í málinum, enn at ákærdu menninir eru varðhaldsfongslaðir.**



*Varðhaldsfongslaðu menninir hava sambært ákærunum stolið fínmetall og síðani selt tað til danskar skrothandlarar*

LÓGARBROT

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Sum Sosialurin greiddi frá hósdagin, eru tveir mans ákærdir fyri stuldur av fínmetalli, serliga rustfríum stáli, messingi og kopari. Tá varð upplýst av kriminaldeildini, at talan higartil er um stuldur fyri útvið 400.000 kr.

Ikki bar til at fáa fatur á ákæranum, Lindu Hesselberg, til blaðið fríggjadagin, men í morgun var hon at hitta. Men hon var tó ikki serliga tíðindafróð, og tað einasta hon í løtuni vil upplýsa er, at menninir vórðu varðhaldsfongslaðir. Hetta varð eisini staðfest av landsrættinum, har menninir kærdu avgerðina.

Linda Hesselberg vildi heldur ikki upplýsa, hvussu leingi menninir, sum eru ávikavist í 60-unum og 40-unum, skulu varðhaldsfongslast. Men um fongslingin varðar longri enn tríggjar dagar, kunnu menninir haldast aftur í upp til fýra vikur.

**Fleiri kanningar**

Tá talan er um varðhaldsfongsling, verður tað gjørt fyri at geva løgregluni betri stundir at kanna málið. Upplýst varð sum nevnt í síðstu viku, at tað, løgreglan higartil er komin fram til, snúði seg um stuldur fyri upp ímóti 400.000 kr. Men talan kann sum skilst verða um nógv størri upphæddir, tá avtornar.

Stuldurin er farin fram á arbeiðsplássum kring landið, fyrst og fremst í Streymoy, Eysturoy og Norðoyggjum. Higartil er einki sum bendir á, at stuldur eisini err framdur í Sandoy og Suðuroy.

Talan er um faðir og son, og teir hava so selt stolna fínmetallið til skrothandlarar í Danmark, til ein eftir øllum at døma undirprís.

Sum sagt skal løgreglan nú kanna málið nærri.

Tórshavnar Sløkkilið:

# Fyrireikar sløkkilið á bygd

**Í sambandi við samanleggingina av Tórshavnar kommunu við Hest og Nólsoy verða sløkkilið nú útbúgvin í hesum bygdum – og í Koltri eisini**

ELDSLØKKING

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

At hava eitt sløkkilið á staðnum um illa vil til er nakað, ið einhvør kommuna átti at syrgt fyri.

Ikki tí, slík lið munnu helst vera í hvørjari bygd ella í hvussu er hvørjari kommunu í landinum. Spurningurin er bara, hvussu væl hesi lið eru fyri at taka ímóti teimum avbjóðingum, ið hesi tíverri fáa av og á.

Síðani Tórshavnar Kommuna legði saman við Nólsoy og Hest kommunnum, hevur verið arbeitt við at fáa útbúgvið fólk í hesum liðum. Bæði í Nólsoy og í Hesti hava sløkkilið verið - í hvussu er á pappírinum, men hetta hevur verið sum so ofta nøkur upplop, har nógv hevur verið gjørt at byrja við, men við tíðini er mest sum alt dottið niður fyri aftur.

Rættiliga tíðliga eftir samanleggingina blivu sløkkiliðsfólk knýtt fast at Tórshavnar Sløkkiliði, og arbeitt hevur síðani verið við eini ætlan, har limir í hesum sløkkiliðum skuldu útbúgvast, bæði innan eldsløkking og innan fyrstuhjálp.

Og í farnu viku hevur so verið skeið í fyrstuhjálp á Brandstøðini í Havn fyri limum í sløkkiliðunum í Nólsoy, Hesti – og Koltri!

**Neyðugt á bygd**

At duga fyrstuhjálp kann koma væl við hjá øllum, men serliga væl kann tað verða hjá teimum, sum búgva úti á bygd, har sjúkrahús og lækni ofta kann vera langt burturi.

Í hesum førinum er talan um tríggjar (út)oyggjar, sum tískil nýtast skip ella bát at koma á sjúkrahús. Ella í besta føri tyrlu, um væl veit við.

Tí vit skulu minnast til, at tað er ikki bara sum at siga tað at hjálpa vanlukkuraktum fólki. Um tú ikki veit, hvat tú ger, er tað ofta til størri vansa enn gagn tað, tú ger.

Hesi fyrstuhjálparskeið snúgva seg í størstan mun um tað, tú kann koma út fyri til gerandis av ymsum vandastøðum. Serliga verður dentur lagdur á hjartasteðg, ið er ein støða, har alneyðugt er at vita, hvat ein ger. Í veruleikanum kann tú einki gera, um tú ikki kennir til fyrstuhjálp. Men eisini sár, beinbrot og forbrenningar verður nomið nógv við.

Hetta eru alt kunnleikar, ið kunnu bjarga mannalívum, ikki minst á smærru støðunum, har sjúkrahús og lækni sum nevnt kunnu vera langt burturi.